búnaðarstovan
Innanhýsis

Kollafjørður, tann 6. september 2017
Mál: 17/00239-3
Málsviðgeri: DJ

**REGLUR FYRI LOYVI AT SKJÓTA GRÁGÁS Í VELTUM LENDI**

Heimildin fyri loyvi at skjóta grágæs í veltum lendi er sbrt. ásetingunum í §17 stk. 3 í Løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m., sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 15. mai 2014
"§17 *stk. 3. Hóast ásetingarnar í stk. 1 og 2 í hesi grein kunnu eigari og leigari av veltum lendi søkja um skrivligt loyvi til at skjóta grágæs, sum hava sett seg á velt lendi, um grundaðir trupulleikar kunnu ávísast. Landsstýrismaðurin gevur skrivligt loyvi og ásetir nærri treytir hesum viðvíkjandi, herundir, at loyvishavarin skal fráboða, hvussu nógvar grágæs verða skotnar, og at myndugleikin kann heinta fuglin til kanningar. Eigari og leigari kunnu heimila øðrum persóni sama rætt. Loyvið til heimildarfólk skal vera skrivligt og kunna vísast fram eftir umbøn frá løgregluni. Ein eigari og leigari kann bert heimila einum persóni loyvi at skjóta á velta lendinum í senn. Landsstýrismaðurin skal stíla fyri, at kanningar og vísindaligar teljingar av grágæs verða framdar."*

Sambært rundskrivi úr Fiskimálaráðnum frá 6. juni 2017 um tíðaravmarkað loyvi at skjóta grágæs, er heimildin sbrt. omanfyri nevndu lógaráseting løgd til Búnaðarstovuna at umsita. Búnaðarstovan er tí loyvisgevari og hevur átalurætt yvir fyri loyvishavara.

Ásetingarnar í rundskrivi Fiskimálaráðsins eru hesar:

*1. Endamál*
*1.1. Sambært løgtingslóg um fuglaveiðu v.m. verða mannagongdir lýstar fyri at veita loyvi til at skjóta grágæs, sum hava sett seg á velt lendi.*
*2. Loyvi at skjóta grágæs*
*2.1. Búnaðarstovan kann veita umsøkjara, sum hevur grundaðar trupulleikar av, at grágæs seta seg á størri velt lendi, tíðaravmarkað loyvi at skjóta grágæs.*
*2.2. Loyvið skal latast til ávísan persón og ikki til eitt felag. Sama er galdandi, tá loyvishavin letur rætt sín víðari til ávíst heimildarfólk.*
*2.3. Loyvið at skjóta skal latast fyri eitt ávíst tíðarskeið, sum ikki røkkur út um 31. mai 2020.*
*2.4. Loyvið kann avmarkast til ávís tíðarskeið á árinum, tá ið trupulleikin er størstur, og til teir partar av landinum, har trupulleikarnir eru staðfestir.*
*2.5. Búnaðarstovan kann seta treytir við loyvinum, sí nr. 4.*
*2.6. Loyvið at skjóta grágæs verður ikki latið, um talan er um almenn frílendi, lendi kring bygningar í bygdum øki og onnur smærri jarðarstykki í ella uttan fyri bygd øki.*

*3. Umsókn um loyvi at skjóta grágæs*
*3.1. Tá søkt verður um loyvi at skjóta grágæs, skal umsøkjari nýta umsóknarblað, sum Búnaðarstovan hevur gjørt til endamálið.*
*3.2. Umsøkjari skal lýsa velta lendið og grundgeva fyri, hvussu stórur trupulleikin er.*
*3.3. Lendið skal lýsast við vídd og matrikulnummari. Eisini skal upplýsast, um talan eitt nú er um nýveltan, nýsáddan ella friðaðan bø.*
*3.4. Trupulleikin kann eitt nú lýsast við tali av fuglum, títtleika og longd á tíðarskeiði, har grágæs seta seg á velta lendið.*
*4. Treytir við loyvinum at skjóta grágæs*
*4.1. Ikki er loyvt at skjóta grágæs, sum liggja á eggum ella ganga við ófloygdum ungum.*
*4.2. Ikki er loyvt at nýta lokkufuglar at fáa gæs at seta seg á bøin.*
*4.3. Loyvishavarin skal regluliga og við árslok lata Búnaðarstovuni fráboðan um tal av skotnum grágásum, umframt nær og hvar gæsnar eru skotnar.*
*4.4. Loyvishavarin kann við millumbilum verða álagdur at senda skotnar grágæs til kanningar.*
*4.5. Búnaðarstovan kann seta aðrar treytir, sum antin av landbúnaðarligum, lívfrøðiligum ella øðrum orsøkum verða mettar rímiligar fyri at røkka endamálinum við lógini.*
*5. Eftirlit við loyvinum at skjóta grágæs*
*5.1. Búnaðarstovan og løgreglan hava eftirlit við, at løgtingslógin, rundskrivið og treytirnar í loyvinum at skjóta grágæs, verða hildnar.*
*5.2. Brot á treytir í loyvinum hava við sær, at Búnaðarstovan kann taka aftur loyvi at skjóta grágæs frá loyvishavanum. Afturtøkan kann hava gildi fyri styttri ella longri tíðarskeið.*
*6. Revsing*
*6.1. Brot á lógina ella treytir í loyvinum, verða annars revsað eftir ásetingunum í 5. bólki í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.*
*7. Gildiskoma*
*7.1. Hetta rundskriv kemur í gildi 7. juni 2017 og fer úr gildi aftur tann 1. juni 2020.*

**Viðmerkingar:**

Loyvi at skjóta grágæs í veltum lendi verður einans veitt fólki við góðkendum vápnaprógvi. Tí skal m.a. avrit av vápnapróvnum latast inn saman við umsóknarblaðnum.

Loyvt er einans at skjóta grágæs sum sita ella lætta sær á flog úr veltum lendi.

Til grágásaveiðu verður mælt til at nýta kalibur 10 ella 12 høglbyrsu, høglstødd BB ella nr. 2, patrónstyrki á í minsta lagi 42 gr. og byrsu við trongum kjóki.

Loyvið skal vísast fram eftir umbøn frá eftirlitsmyndugleikanum, t.v.s. løgregluni ella Búnaðarstovuni. Brýtur loyvishavari treytirnar í loyvinum ella ásetingar í lógini, kann Búnaðarstovan taka loyvið aftur uttan aðra ávaring.

*Viðvíkjandi ásetingunum í stykki 2.1:*

Búnaðarstovan metir í hvørjum einstøkum føri um, hvørt umsóknin lýkur ásetingarnar um trupulleikar, vídd á lendinum o.tíl. Vegleiðandi kann verða nevnt, at epla/róta/grønmetisveltur >250 $m^2$, og nýveltur /nýsáddur bøur og akur >500 $m^2$, vanliga lúka ásetingina um vídd á lendinum sbrt. 2.1.

*Viðvíkjandi ásetingunum í 2.2:*
Loyvið frá Búnaðarstovuni at skjóta grágæs í veltum lendi er persónligt og verður latið skrivliga. Loyvishavarin kann skrivliga heimila øðrum persóni rættin at skjóta grágæs sína vegna, og treytirnar, sum loyvishavarin hevur fingið í sínum loyvi frá Búnaðarstovuni, skulu tá fylgja við í hesi heimildini.

*Viðvíkjandi ásetingunum í 2.6:*
Búnaðarstovan metir í hvørjum einstøkum føri um, hvørt umsóknin lýkur ásetingarnar um m.a. tættleika til bygt lendi, vídd á lendinum o.tíl. Vegleiðandi kann verða nevnt, at loyvi kann verða veitt til at skjóta grágæs á traðum, hóast hús eru har, um trygdarfrástøðan annars er í lagi, sí eisini um 4.5.

*Viðvíkjandi ásetingunum í 4.3:*
Loyvishavarin skal við hvørt árslok lata Búnaðarstovuni fráboðan um tal av skotnum grágásum, umframt nær og hvar gæsnar eru skotnar. Freistin at boða frá er hálvan januar mánað árið eftir. Verður fráboðanarskyldan mótvegis Búnaðarstovuni ikki hildin, fellur loyvið av sær sjálvum burtur beinanvegin.

*Viðvíkjandi ásetingunum í 4.5:*
Tá skotið verður, skal trygdarfrástøðan, roknað sbrt. høglstøddini í patrónunum (høgldiameturin í mm x 100 nýtt sum frástøða í metrum) verða hildin. Byrsumálið at skjóta grágæs skal ikki vera longri enn uml. 25 - 30 m. Búnaðarstovan treytar sær óskerdan rætt at seta aðrar treytir, sum, antin av landbúnaðarligum, lívfrøðiligum ella øðrum orsøkum, verða mettar rímiligar fyri at røkka endam